Helgi Abramhamsen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 3/2019 frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingskvinnu um oljudálking í náttúrini, settur landsstýrismanninum í umhvørvismálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

Spurningurin var soljóðandi:

1. Hvør hevur ábyrgdina av at rudda upp eftir oljudálking í náttúruni?
2. Um tveir partar eru ósamdir um, hvør eigur ábyrgdina av einari oljudálking, hvør skal so syrgja fyri, at dálkingin verður tikin upp, og ikki verður liggjandi í náttúruni?
3. Hvørjar heimildir eru fyri bót, revsing ella øðrum, um so er, at oljudálking ikki verður tikin upp?

Svar:

Til spurning 1

Yvirskipað er tað dálkarin, sum hevur ábyrgd av at rudda burturkast, olju og annað burtur.

Fyri at basa oljudálking á sjónum krevst serlig útgerð. Tí er í lógini um verju av havumhvørvinum ásett, at kommunur skulu basa oljudálking í havnum, fram við bryggjum, havnarløgum og í bátahyljum. Uttan fyri hesi øki er tað Landsverk, sum skal basa dálkingini.

Um tað er staðfest, hvør dálkarin er, ber hann kostnaðin fyri at basa dálking. Er dálkarin ókendur, ber ávikavist kommunan ella Landsverk kostnaðin.

Tað eru ongar beinleiðis ásetingar um at basa oljudálking uppi á landi, men her eru tað vanligu reglurnar um burturkast, sum galda.

Øll skulu lata sítt burturkast til ta kommunalu burturkastskipanina. Tað er eisini galdandi fyri olju.

Eigarar skulu beina burturkast/olju á privatum økjum burtur. Á almennum økjum er tað uppgávan hjá kommunum.

Kommunur skulu, um neyðugt, geva boð um, hvussu burturkast/olja skal burturbeinast.

Ber ikki til at staðfesta, hvør hevur ábyrgdina, skal kommunan burturbeina burturkast/olju.

Til spurning 2

Sum nevnt omanfyri, eru tað ávikavist kommunan og Landsverk, sum skulu basa oljudálking á sjónum. Er talan um dálking uppi á landi, skal kommunan geva tí, sum hevur ábyrgdina, boð. Kann tað ikki staðfestast, hvør hevur ábyrgdina, beinir kommunan oljuna burtur, og ber kostnaðin.

Til spurning 3
Um ein borgari ella eitt virki ikki ger eftir boðum frá kommununi um at taka burturkast ella olju upp, kann borgarin/virkið verða revsað við bót.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið 14. oktober 2019

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður